Slóðbrótandi listaframsýning:

# Reyðir metrar í minuttum

**Nýútlærdu Marianna Mørkøre og Rannvá Káradóttir, ið júst hava lokið bacchelorprógv innan ávikavist Fashion Promotion og Contemporary dance, ætla sær í næstum til Kanada og New York, har tær fara at fyrireika eina øðrvísi og spennandi listaframsýning**

SLÓÐBRÓTANDI LIST
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Marianna Mørkøre og Rannvá Káradóttir. Onnur hevur júst vunnið eina virðisløn fyri at hava bestu bacheloruppgávu í Fashion Promotion í Onglandi. Hin hevur eina 1st class degree innan Contemporary dance. Tær hava arbeitt saman fyrr, við skúlaprojektum hjá hvørji aðrari, og kennast væl.

Nú hava tær av álvara sligið høvdini saman, og saman ætla tær at skapa eina listaframsýning fyri føroyskum ungdómum í aldrinum 20-25 ár.

## Spennandi og slóðbrótandi

Men talan er ikki um nakra vanliga listaframsýning. Ætlan teirra er at nýta miðlarnar hjá hvør aðrari, sum eru dansur og móti, og samantvinna teir við filmslist. Endamálið er at fáa alt at ganga upp í eina hægri eind á ein nýggjan og slóðbrótandi hátt.

Marianna Mørkøre, sum Sosialurin fekk orðið á, sigur at tað í Føroyum er so ógvuliga avmarkað hvat fær loyvi at koma undir heitið »list«.

– Tá tú kemur burtur frá Føroyum, fært tú veruliga ein skelk av at síggja hvussu nógv kemur undir at vera list í útheiminum. Alt er loyvt, og listafólk kunnu úttrykkja seg á óendaligar hættir. Í Føroyum er nærum alt tað sama, við málningm, tekningum o.s..fr Vit ætla at vísa føroyskum ungum, hvat list eisini kann vera, greiðir Marianna frá.

Tær halda báðar, at tað verður alt ov lítið gjørt við at geva post-tannáringunum, t.v.s. teimum, sum eru í aldrinum 20-25 ár, íblástur og nýggj hugskot.

– Vit hava báðar búð í London, hava arbeitt við nógvum ymiskum listafólki og hava sæð hvat hendir innan listina har. Men tey ungu í Føroyum hava ikki teir møguleikarnar. Nógv eru áhugað í list, og vit ætla okkum at vísa teimum okkurt heilt øðrvísið, sigur Marianna.

Hon staðfestir, at tey í 20'unum eru ein eftirbátur, hvat ið listini viðvíkur. Og tað ætla tær báðar sær nú at gera nakað við.

## Reyðir metrar í minuttum

Rannvá og Marianna ætla sær at eksperimentera við rørðslumyndum, ljósi, ljóði, stødd og tíð. Onnur er koreograf, hin er designari og samantvinnandi miðilin verður upptøkutóli, sum tær ætla at nýta á ein øðrvísi og spennandi hátt.

– Tað, sum er so facinerandi við upptøkutólinum er tað, at tað ber til at manipulera tað, sum eygað sær. Á hendan hátt hava vit, sum listakvinnur, tamarhald á hvat vit vilja leggja høvuðsdentin á, siga tær.

Verkætlanin verður býtt í tveir partar. »Reyðir metrar í minuttum« er ein listaframsýning við rørslumyndum, har tær fara at spæla við ljós, ljóð og rørslu og flætta egnar royndir og vitan saman. Tær hava jú fingist við ógvuliga ymisk ting, og royndirnar eru tí ógvuliga ymiskar.

Ætlanin er at fara til eina lítla oyggj uttan fyri Montreal í Kanada, har tær vera í 4 vikur, fáa sær íblástur og taka upp. Endamálið við at fara haðar at taka upp, er, sum tær sjálvar siga, – At fáa sett ting í perspektiv og at sleppa tí sjálvsagda og siðbundna.

Síðani verður steðga eina viku í Montreal og eina viku í New York, har tær báðar fara at luttaka á ymiskum skeiðum innan listagreinir teirra. Har fara tær at møta virkandi listafólki og fáa samband við onnur fólk, ið fáast við list. Her kunnu tær sostatt fáa hjálp og íblástur til at fáa tað besta burturúr upptøkunum, og sostatt fáa úrslitið so gott sum gjørligt.

Hin parturin av framsýningini verður ein stuttfilmur, ið vísir hvussu tær arbeiða seg fram til endaliga úrslitið. Hetta verður ein dokumentarfilmur, einar 20 minuttir til longdar, og hann fer at vísa áhugaðum, hvussu ein øðrvísi listaframsýning verður til frá byrjan til enda. Hann skal virka sum íblástur til teirra, ið hava hug at royna nakað nýtt og eksperimenterandi.

Filmurin fer at geva eina realistiska mynd av arbeiðsgongdini. Ein listaframsýning av slíkum slag er jú ein stór avbjóðing, men Rannvá og Marianna trúgva uppá, at tað letur seg gera, og tað vilja tær prógva við dokumentarfilminum. Til íblástur fyri onnur listaáhugað ung í Føroyum.

## Málið: januar 2005

Hugskotið til verkætlanina kom í lag, eftir at tær høvdu lokið útbúgvingarnar. Tær sótu og prátaðu saman, og høvdu báðar hug til at arbeiða innan eksperimenterandi list, har tær kundu nýta vitanina, tær hava fingið ígjøgnum útbúgvingina, og samstundis menna seg meiri. Eisini vildu tær gera nakað listarligt fyri tey 20-25 ára gomlu.

Tær hugsaðu fyrst um hvat tær høvdu hug til. Síðani hvat var realistiskt og hvat tær kundu skaffa pening til. Og í oktober mánaði leggja tær til brots. Rannvá og Marianna hava longu bílagt Smiðjuna í Lítluvík til framsýningina av verkætlanini, sum ætlandi verður 6.-12. januar í 2005. Talan verður um eina listaframsýning við livandi myndum, har fleiri projektørar verða nýttir. Framsýningin verður sostatt sett upp á ein ógvuliga ótraditionellan hátt.

Spennandi verður at síggja hvat tær báðar koma fram til. Tað verður tó ikki avdúkað fyrr enn um fýra mánaðir, hvussu dansur og móti kunnu samantvinnast til eina listaframsýning við livandi myndum.







*Marianna Mørkøre og Rannvá Káradóttir fara í næstum til Kanada har tær skulu gera eina listarliga verkætlan, nevnd reyðir metrar í minuttum*
*Myndir: Kristina Sørensen*



# Marianna Mørkøre í Blueprint

**Marianna Mørkøre, sum herfyri vann eina stóra kapping fyri síðstaárs mótalesandi í Onglandi, fekk nakað eftir kappingina, sera góða umtalu í blaðnum Blueprint, ið er fremsta blaðið innan design, arkitektur og mentan**

MÓTI
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Marianna hevði til fráfaringaruppgávu sína gjørt ein kassa, við einum lítlum holi at hyggja ígjøgnum. Inni í kassanum var ein projektørur, ið vísti ein film av gentum, sum m.a. hoppaðu band og elastik í Havn. Eisini hevði hon sett fleiri spegl upp inni í kassanum, so myndin bleiv brotin og kastað aftur fleiri ferðir.

Marianna hevði bundið nøkur av klæðunum, sum genturnar vóru í, men legði serliga dent á ljós, ljóð og rúmd.

Henda verkætlanin bergtók strongu dómararnar so mikið, at Mariann vann sera hørðu kappingina fyri nýskapandi hugsunarhátt.

At koma í blaðið Blueprint er ein ógvuliga stórur heiður og ein stór viðurkenning. Serliga fyri ungar og óroyndar sniðgevar er tað av stórum týdningi at fáa umtalu í hesum blað, sum øll innan mótaheimin lesa.

## Blueprint

Á heimasíðuni www.design4design.com, ið er ein mótasíða burturav, stendur m.a. soleiðis um Blueprint:

Blaðið verður skýrt at vera uttan kapping frá hinum bløðunum á marknaðinum, at hava fantastiskar myndir og framúr góða skriving. Blueprint megnar betur enn nakað annað blað at útvega nýggjar hættir at síggja design og samfelag uppá.

Tey, ið lesa Blueprint eru bæði elitan innan design og arkitektur, núverandi, væletableraðar stjørnur eins væl og morgindagsins komandi nøvn.

Blueprint hevði m.a hetta at siga um Marionnu og endaligu uppgávu hennara.

*»Í fyrstuni sær kassin ikki út av nógvum, men tá tú hyggur inn í hann, verður ein heilt nýggjur heimur opinberaður. Hetta er heimurin hjá Marionnu Mørkøre...*

*Mørkøre, 26, er voksin upp í Føroyum...Í filmi hennara, sum er tikin upp í heimlandinum, síggjast modellir spæla, við føroysku fjøllunum og havinum í bakgrundini... Myndirnar av gentunum og fjøllinum rundan um Tórshavn verða reflekteraðar og brotnar av ymsu speglunum inni í kassanum.*

*Marianna sigur, at ætlanin bert var at seta móta inn í ein øðrvísi samanhang, og at hon ikki ætlaði at nýta heilt serliga landslagið har heima til at eksperimentera við. Hon sigur tó, at hon er ógvuliga ávirkað av stóru, fríu víddunum í Føroyum...*

*Mørkøre ætlar sær at arbeiða sjálvstøðugt, heldur enn at elta eina yrkisleið innan mótaheimin. Hon ætlar sær heldur at arbeiða innan film...*

*Watch this space..."*




# Tryggja tunnilsloft

**Arbeitt verður komandi vikurnar í Leynatunlinum. Tunnilin er stongdur, og ferðslan verður leidd eftir gamla vegnum undir Leynaklivum**

FERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Meðan arbeitt verður í Leynatunlinum, verður ferðslan við ferðsluljósum leidd undir Leynaklivar*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Leynatunnilin er stongdur, tí fólk hjá Landsverki eru farin at tryggja loftið. Samstundis arbeiðir fólk frá SEV og Føroya Tele við at leggja nýggjar kaðalar í vegbreytina.

Birgir Johannesen hjá Landsverki, sigur, at serliga vestari endi á loftinum hevur verið í heldur vánaligum standi.

Loftið verður nú tryggjað við boltum, eins og betong eisini verður sprænt uppundir, sigur Birgir Johannesen. Eisini hava verið onkrir lekar undan loftinum, sum nú skulu tettast, sigur hann.

Meðan fólk frá landsverki arbeiða undir loftinm, verður eisini arbeitt í vegjaðaranum.

Fólk hjá Føroya Tele og Sev nýta høvið, nu tunnilin kortini er stongdur fyri ferðslu, at leggja nýggjar kaðalar gjøgnum tunnilin. Tá nú grivið er, fer landsverk eisini at gera nýggjar rennur og brunnar í vegkantin. At enda skal vegbreytin eisini asfalterast, sigur Birgir Johannesen.

Í fyrsta lagi verður Leynatunnilin stongdur fyri allari ferðslu hetta til 17. september, siga tey á Landsverki. Tá verður roknað við, at arbeiðini, sum gjørd verða í vegbreytini, eru liðug, og tunnilin verður opin fyri ferðslu um kvøldið og náttina, tá ikki verður arbeitt undir loftinum. Eina viku inn í oktober ella so fer arbeiðið væntandi at vara, metir Birgir Johannesen.

Meðan arbeitt verður í Leynatunlinum, verður ferðslan leidd við ferðsluljósum eftir gamla vegnum undir Leynaklivum. Vegurin er ikki tíðarhóskandi, og tí er neyðugt at hava einvegis ferðslu.

# Johan Dahl hevur einki frætt

**Hóast álvarsligar ákoyringar um ivasom fíggjarviðurskifti, sum høvdu við sær, at Johan Dahl í vár mátti leggja frá sær sum landsstýrismaður, hevur hann einki orð frætt aftur. Hvørki frá rættinum ella øðrum. Hin parturin í málinum sigur tað vera so torgreitt, at bíðað verður við viðmerkingum**

POLITIKKUR
*Edvard Joensen*



*Málið, sum feldi Johan Dahl sum landsstýrismann, var politisk manøvra frá mótstøðumonnunum, sum onkrir av egnum floksfeløgum eisini vóru uppií, sigur fyrrverandi landsstýrismaðurin, sum enn einki meira veit um nakað sakarmál*

Johan Dahl, fyrrverandi landsstýrismaður, metir tað sum púrgjørdan tramansskap, at hann mátti úr sessinum í Fiskimálaráðnum fyrr í ár. Síðan hevur hann hvørki hoyrt orð ella eið í tí málinum, sigur hann. Hin parturin i málinum sigur málið vera so torgreitt, at bíðað verður við viðmerkingum.

Mikið rok stóðst í vár av skuldsetingum, sum reistar vórðu móti Johan Dahl, nýútnevndum landsstýrismanni við fiskivinnumálum, um eitt ávíst mál, har róð varð framundir, at hann hevði gjørt ymsar fíggjarligar mønøvrur, sum kanska ikki vóru heilt í lagi. Málið endaði við, at løgmaður rak hann úr landsstýrissessinum.

Síðan hevur Johan Dahl ikki frætt eitt einsata petti um hetta málið, sigur hann. Og hann metir tað sum eitt politiskt átak móti sær.

– Eg eri sannførdur um, at alt hatta málið var politiskt. Ein manøvra frá politiskum mótstøðumonnum, sum partar av mínum egna flokki eisini vóru uppií, sigur Johan Dahl við Sosialin.

Johan Dahl heldur ikki, at hann fer at reisa nakað sakarmál um ærumeiðing í hesum førinum.

– Tað førir ikki til nakað annað enn, at alt verður rivið uppaftur, og eg og familja mín skulu gjøgnum sama runudíkið einaferð, enn. Og tað havi eg als ongan hug til, sigur hann.

Hinvegin udrast hann á, at einki frættist aftur, tá tað í vár var so umráðandi at fáa lýst hetta málið.

– Tað kann vera, at málið ikki er so greitt, sum tað var sett upp. At tað var Johan Dahl, sum var einsamallur var skálkurin í hesum, sum hent var, heldur hann.

Tað er ein søgulig sannroynd, at felag hansara, sum meginparturin av samfelagnum sum heild, fór á húsagang, ásannar hann. Men hann tvíheldur um, at hann hevur goldið øllum, hann skyldaði pengar, sín part aftur.

Ein annars týðandi persónur í málinum var Inge Kruse Jensen, sum er einkja eftir mann, sum var í handilsfelagsskapi við Johan Dahl.

Hon sigur við Sosialin, at hon veit ikki rættiliga, hvussu málið stendur í løtuni. Eitt sakarmál móti einum triðja persóni í handilsfelagsskapinum hjá Johan Dahl og manni hennara hevur júst veirð fyri í rættinum, men hon veit ikki úrslitið enn.

– Hetta er eitt so torskilt og fløkt mál, sum er sera ringt at fáa nágreiniligt innlit í, at eg vil helst einki siga enn, sigur hon í stuttari viðmerking við Sosialin.

# 10 metra fallið lógarbrot

Tann 17 ára gamli unglingin, sum mikumorgunin í farnu viku var fyri arbeiðsóhappið, tá hann datt gjøgnum plexiplátu á tekju, kann vænta sær endurgjald, og at málið verður koyrt til fútan.

Arbeiðseftirlitið hevur kannað málið og sagt verður, at tað er sannlíkt, at brot er framt á arbeiðseftirlitslógirnar. Um ein plexipláta er í tekju, so er hetta at meta sum hol í tekjuni, og skal hetta holið tískil dekkast til ella skermast av.

Men plexiplátan í tekjuni á bygninginum hjá Farmaleiðum, har ungi maðurin datt tíggju metrar ígjøgnum, var ikki avbyrgd ella dekkað til. Holið var ein metur ganga tríggjar metrar til støddar.

Av Arbeiðseftirlitinum verður sagt, at frágreiðingin er liðug, men at hon er ikki almannakunngjørd enn. Men av Arbeiðseftirlitinum frætta vit, at væntandi verður málið koyrt til fútan, tí í prinsippinum er lógarbrot framt.

Tann 17 ári gamli maðurin, sum varð fyri óhappinum, breyt annan skøvningin og báðar armarnar.

**-hkm**